ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

## Hug til at arbeiða við sosialpolitikki?

Lýst verður eftir fulltrúa til nýggja Almannamálaráðið skjótast til ber.

**Um starvið**
Sum fulltrúi luttekur tú í arbeiðinum at fyrireika lógaruppskot og uppskot til kunngerðir á almannaøkinum, at svara fyrispurningum frá Løgtinginum, at svara fyrispurningum frá borgarum o.a.

Ætlanin er í næstum at fara undir størri verkætlan at endurskoða galdandi føroysku sosiallóggávuna (forsorgarlógina), og kemur tú eisini at luttaka í hesum arbeiði. Hetta arbeiðið fevnir um at gera útgreiningararbeiði og analysur av ymiskum slagi. Um tú ert løgfrøðingur koma tínar uppgávur í størri mun at snúgva seg um løgfrøðiligu spurningarnar í hesum sambandi.

Hóast starvið er sjálvstøðugt og ábyrgdin stór, so verða uppgávurnar loystar í samstarvi við aðrar starvsfelagar, eitt nú leiðandi løgfrøðingin í ráðnum. Tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi eftirútbúgving.

**Førleikakrøv**
Tú hevur samfelagsliga útbúgving frá hægri lærustovni sum eitt nú cand.scient.pol, cand.scient. adm. ella cand.jur. Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar viðkomandi starvsroyndir eru ein fyrimunur. Harumframt hevur tú góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almannamálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, settur aðalstjóri, ella Hallberu F. West, ráðgeva, telefon 30 40 50, ella t-post amr@amr.fo.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist**
Umsókin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. desember 2008, kl. 12.00.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO

VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Søkt verður eftir avloysara til Vinnumálaráðið

Fyri løgfrøðing í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara til Vinnumálaráðið frá 1. februar 2009 og fram til 1. desember 2009.

Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðinginum er at ráðgeva landsstýrismanninum og stjóranum í løgfrøðiligum spurningum. Harumframt fevnir arbeiðið um gerð av lógar- og kunngerðaruppskotum og máls- og kæruviðgerð.

Umsøkjari skal hava løgfrøðiligt embætisprógv og skal duga føroyskt og enskt væl.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 15. desember 2008.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Vinnumálaráðið
Postsmoga 377
Tinganes
FO-110 Tórshavn

Áhugað eru vælkomin at ringja til Arna Poulsen á telefon 556070.



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SKEIÐ Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA
– várið 2009

## Próvskeið í føroyskum

Á skeiðnum lærir tú at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi, og tú fært betri fatan av føroyska málinum.

| | |
|---|---|
| **Lærari:** | Randi Kúrberg |
| **Skeiðsstað:** | Fróðskaparsetur Føroya, Jónas Broncks gøtu 25, 4. hædd, 100 Tórshavn |
| **Tíðarskeið:** | 5. jan.-26. mars 2009 (12 vikur). |
| Próvtøka: | 28. og 30. mars 2009 |
| Tilmelding: | Tilmeldingarskjal á heimasíðuni: www.setur.fo |
| Tilmeldingarfreist: | 18. desember 2008 |
| Tilmeldingargjald: | kr. 1.000,00 |
| Próvtøkugjald: | kr. 500,00 |

Undirvísing er mánadagar og hósdagar, báðar dagar kl. 16.15 - 18.30, umframt leygardagin 7. mars kl. 9.00-14.30.

Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt sum móðurmál og hava gingið í miðnámsskúla ella samsvarandi.

Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, so hvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

Nágreiniligari upplýsingar um skeiðið eru at fáa á Setursskrivstovuni. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

## Goymsluhøli til leigu

Umleið 400 fermetrar av góðum goymsluhøli til leigu.

STUBBIN

Fjarðarvegur 12 · FO 350 Vestmanna · Tel 218 540
stubbin@stubbin.fo · www.stubbin.fo

HEIM • STYLING

INTERIOR • TLF 258543

**ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN**

Eldri maður søkir íbúð í Tórshavn frá 1. februar

Eri friðarligur og fari væl um

**Ring á tlf. 22 00 22**

Sosialurin
www.sosialurin.fo